# Føroya Kolvetni fær 80 mill. kr. í Bretlandi

**Bretska oljufelagið Dana Petroleum og íløgurgrunnurin 3i í Bretlandi hava gjørt av at seta 80 mill. kr. í Føroya Kolvetni. Peningurin skal nýtast til komandi boring og arbeiðið annars eitt nú uttan fyri føroyska økið**

OLJA OG FÍGGING
*Jan Müller*




*Tveir fegnir oljumenn. Graham Stewart, nevndarformaður í Føroya Kolvetni og stjóri í nýstovnaða Faroe Petroleum í Bretlandi her saman við Niels Sørensen, stjóra í Føroya Kolvetni. Tað hevur nú loksins eydnast teimum at fáa útlendskar íleggjarar til eitt nú fyrstu boringina hjá felagnum í føroyskum øki.*

*Mynd Jan Müller*

Tað hevur eydnast oljufelagnum Føroya Kolvetni at útvega 80 mill. kr til sína fyrstu boring á føroyska landgrunninum. Sambart internetútgávuna av The Telegraph hava enska oljufelagið Dana Petroleum og ein tann størsti íløgugrunnurin í Bretlandi, 3i (venture capitalists) sett 7 mill. pund í lisenspartin hjá Føroya Kolvetni. Hesin hevur verið 7% av loyvinum hjá Agip men við møguleika fyri at fara uppá 22%. Hetta merkir sostatt, at ætlanin hjá Føroya Kolvetni at brúka optiónina tað hevur havt í Agiplisensinum, er vorðin til veruleika.

Graham Stewart, nevndarformaður í Føroya Kolvetni og nú eisini stjóri í nýstovnaðum holdingfelag "Faroe Petroleum" í Bretlandi sigur við The Telegraph, at føroyska undirgrundin kann goyma fleiri milliardir tunnur av olju. Víst verður á, at Føroya Kolvetni hevur lut í sokallaðu gullblokkunum, sum liggja bara 20 kilometrar frá Foinaven og Schiehallion oljukeldunum, sum standa fyri 10% av bretsku oljuframleiðsluni. Føroyar kunnu gerast eitt lítið Kuwait í Norðuratlantshavi er Graham Stewart endurgivin fyri at siga.

Telegraph sigur annars, at Føroya Kolvetni ætlar at fara á London Stock Exchange, partabrævamarknaðin tíðliga í summar.

Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni í Føroyum sigur, at tað er felagið, sum er skrásett í Føroyum , sum fær pengarnar, tí tað eigur lisensin. Felagið í Bretlandi er meira at meta sum eitt móðurfelag. Niels Sørensen sigur, at skal tú brúka so nógvar pengar til eina boring sum hesa, so er man noyddur at fara av landinum eftir pengunum. Tað vísir seg ikki at verða nokk av risikovillingum kapitali í Føroyum at fara undir eina so stóra og váðiliga íløgu.

Peningurin, sum nú verður settur í felagið er so bæði til rakstur og til aðrar uppgávur hjá felagnum. Her verður m.a.. hugsað um 9 ára loyvið, sum Føroya Kolvetni eisini hevur saman við Agip. Niels Sørensen, stjóri sigur, at peningurin eisini er ætlaður at brúka til íløgur uttan fyri Føroyar.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæri pápi, beiggi, verfaðir og abbi

**Hans Jacob Debes**

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 26. januar, 62 ára gamal.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 31. januar kl. 13.00 úr Vesturkirkjuni

*Fyri tey avvarðandi*

**Per, Elin, Súsanna og Ólavur**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á ymiskan hátt á 85 ára føðingardegnum tann 22. desember.
Ein serlig tøkk til sangkórið í Siloa, eisini ynski eg ætt og vinum eitt av Harranum siga 2003.

**Lina Jacobsen,
við Gjógvará Fuglafjørður**

# DJ-Show í Hvalba

TÍÐINDASKRIV




Nú leygarkvøldið tann 1.febr. kl. 23:00-04:00 verður stórt tiltak í Roynhøllini í Hvalba. Tað er nevniliga DJ-SHOW og FREESTYLERS-kappingin, sum í eini tíð hevur verið í Havn og inni í Eysturoynni seinni helvt av 2002.

Nú er so túrurin komin til Suðuroy ella rættari Hvalba, har tiltakið verður, og sum nevnt í Roynhøllini.

Tiltakið byrjar kl. 23.00 og endar kl.4:00. Eitt atgongumerki kostar kr. 100,-. Sjálv "Freestylers-kappingin" byrjar kl. 02:00 og heldur áfram til kl. 03:30. Til tey sum ikki vita hvat "Freestylers" er, kann í stuttum sigast at hvør sum hevur hug, kann fara upp á pallin at framføra eitt hvørt annað ein hevur hug til, t.v.s. syngja "Karaoke" ella dansa, rappa v.m.


## Móttøka

Í samband við at okkara trúgvi og góði starvsfelagi Asbjørn Stenberg fer frá vegna pensiónsaldur, verður móttøka

fríggjadagin 31.01.2003
hjá P/F Wenzel, Akranesgøta 5
Kl. 14.00 til 16.00.

Asbjørn byrjaði at arbeiða hjá okkum 09.06.1981, og hevur sostatt verið hjá okkum í sløk 22 ár.
Vit takka Asbirni fyri tíðina og fyri tað góða og ábyrgdarfulla arbeiði hann hevur framt í verki fyri P/F Wenzel.
Vit ynskja honum við familju, blíðan byr framyvir.



P/F Wenzel
Tlf. 354500
www.wenzel.fo




# Fimm ungir mans sekir í neyðtøku

**Fimm mans vóru týsmorgunin dømdir fyri hópneyðtøku av einari 15 ára gamlari gentu í rættinum í Silkeborg. Ein teirra var herfyri fríkendur fyri at hava neyðtikið eina føroyska kvinnu**

NEYÐTØKA
*Ingi Rasmussen*

Tað sær út sum tilvild ræður, nær dómur fellur og ikki, tá talan er um neyðtøku.

Tað er eitt av sjónarmiðunum, nú tey neyðtøkumál eru ovast á breddanum í Danmark.

Í gjár fann rætturin í Silkeborg fimm mans sekar í at hava neyðtikið eina bert fimtan ára gamla gentu. Ein teirra var eisini ákærdur í hópneyðtøkuni av einari 25 ára gamlari føroyskari kvinnu í Keypmannahavn; tá varð hann fríkendur.

Hesaferð fingu menninir úr fýra mánaðum upp í hálvtannað ára fongsul.

Málini eru annars lík í mongum. Fleiri menn, sum í felag eru kynsliga saman við einari kvinnu, pástanda, at kvinnan vildi sjálv, hóast kvinnan hevur meldað tilburðin.

Munurin er, at tann 15 ára gamla danska gentan ikki meldaði fyrr enn fýra mánaðir aftaná, tí hon ikki tordi. Tann føroyska meldaði beinanvegin, tá hon var sloppin leys. Sostatt vóru sjónlig prógv í málinum við føroysku kvinnuni, eitt nú DNA-royndir, meðan ongi prógv vóru í málinum við tí ungu donsku gentuni. Sostatt vóru tað bara vitnisførslur, sum feldi menninar í Silkeborg.

Málið í rættinum í Silkeborg rætti vitnaði annars um fimm ungar mans við einum avskeplaðum sexmorali. Unga gentan varð langt út á náttina tvingað til samlegu og annan kynsligan ágang, sum pornológgávan helst noktar okkum at lýsa í blaðnum.

Umframt tann eina, sum var fríkendur at hava neyðtikið føroysku kvinnuna, var ein annar maður, sum vitnaði í tí málinum, uppíblandaður hesaferð. Hann fekk harðasta dómin, tí hann eisini tvingaði gentuna til anal-sex. Tann 23-ára gamli maðurin, ið var fríkendur í føroyska málinum, bleiv hesaferð dømdur fyri at halda ungu gentuni, meðan hinir neyðtóku hana. Hann hevur sum tann einasti kært dómin.

Føroyska kvinnan hevur kært dómin inn fyri Eystara landsrætt, og tá fer tað óivað at vera ført fram, at hesin maðurin áður hevur gjørt seg kynsliga inn á konufólk.

# Barsskor fekk maskinsteðg

**Stutt fyri middagsleitið mánadagin, fekk Barsskor maskinsteðg á Pollinum á veg til Klaksvíkar**

SAMFERÐSLA
*Solby A. Eliasen*



*Í gomlum døgum hevði Barsskor lítla bát sleipandi aftan á sær. Hann varð nýttur, tá ikki kundi leggjast at. Mánadagin sá tað eina løtu út, sum Barsskor var lítli bátur hjá Ternuni*

**Klaksvík:** Tað gongur onki serligt hjá tveimum av teimum trimum strandferðsluskipunum, sum sigla millum Klaksvík og ávíkavist Leirvík og Syðradal á Kalsoynni. Dúgvan er í hesum døgum á beding, tí hon fekk skaða á gronina, tá hon rendi á í Leirvík herfyri, og mánadagin steðgaði Barsskor upp á pollinum.

Barsskor var fullur av fólki, sum skuldi til jarðarferð í Klaksvík. Menninir umborð bóru skjótt at og róptu á Ternuna, sum røkir siglingina fyri Dúgvuna, og bóðu um hjálp. Og stutt fyri middag kom Ternan sleipandi við Barsskor, sum nú nærkast teimum áttati, inn eftir vánni.

Seinni um dagin sigldi Barsskor aftur sum vanligt.

## Føroya Bjór fekk bót

**Í rættinum mánadagin bleiv Føroya Bjór dømt at rinda eina bót upp á 10.000 krónur fyri brot á lógina um at lýsa við sterkum løgum. Hinvegin varð Club 20 í Havn fríkent**

RÆTTARMÁL
*Solby A. Eliasen*

Føroya Bjór varð dømt, tí tað var mett at vera brot á lógina at tey lýstu við matuppskriftum á baksíðuni á Dimmalætting har øl var nýtt. Eisini vóru myndir av teimum sterku ølunum. Hetta metti dómarin var brot á lógina og dømdi tískil Føroya Bjór at rinda 10.000 krónur í bót.

Club 20 varð hinvegin fríkent, tí dómarin metti ikki, at tað vóru haldgóð prógv fyri, at tey høvdu brotið lógina, tá tey lýstu við at Jólabryggj fór fyri hálvan prís. Orsøkin var, at ikki kundi staðfestast, um talan var um tað sterka ella tað veika jólaølið. Og sostatt kom ivin Club 20 tilgóðar, og felagið varð fríkent.


Sosialurin Sosialurin 1



## Starvsfólk til Telebúðina í Miðvági

"Eg havi ikki stóra virðing fyri fólki, sum erpa sær av, at tey stríðast og strevast. Er arbeiðið hjá teimum veruliga so hart, eiga tey at fara at gera okkurt annað"

Andre Gide



Telebúðin í Miðvági er ein av seks Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.

Telebúðini í Miðvági tørvar handilsfólk/skrivstovufólk at arbeiða hálva tíð. Innihaldið í starvinum er at taka lut í øllum uppgávum, ið skulu til, fyri at viðskiftafólk okkara fáa bestu tænastu. Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi og spennandi starv í størri menning. Eisini er møguleiki at vera við at menna Telebúðirnar sum heild. Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur handilsútbúgving/ skrivstovuútbúgving og stóran áhuga á økinum.

**Førleikar hjá umsøkjarunum:**
- royndir at avgreiða viðskiftafólk
- royndir við fjarskiftisútgerð og/ella aðrari tøkni
- áhuga fyri og førleika í tøkni
- teldukunnleika á brúkarastøði
- evni at arbeiða og avgreiða mál í einum arbeiðsdegi, har stundum nógv er at gera
- førleika í øllum vanligum handilsskapi, t.d. kassauppgerð og vøruteljing.

Telebúðin í Miðvági er opin mánadag til fríggjadag frá kl 09.00-16.00.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið fyri økið hjá Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torja Johannesen, leiðara á Føroya Tele í Miðvág á tlf. 33 20 00 ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 30 30 30.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. februar 2003 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE